# – Skilji ikki alt

## Dagsskráin

Mikudagur 10. august

| | |
|---|---|
| 9:00 | Útpurring |
| 9:10 | Morgunmatur |
| 10:00 | 2. bíbiltími: "Guds góði vilji" v. Christian Joensen. Bólkaarbeiði í kømrunum |
| 12:00 | Døgurði, við einum vitnisburði |
| 13:00 | Kioskin opin/leiðarafundur |
| 14:00 | Breytir (nógv spennandi) |
| 15:45 | Frívilligur drekkamunnur |
| 16:00 | Frívilligar breytir |
| 18:00 | Náttturði, við einum vitnisburði |
| 19:00 | Kioskin er opin. Samtalu og forbønarrúmið er opið til kl. 22:00 |
| 19:30 | Sang- og vitnimøti |
| 22:00 | Drekkamunnur og hugnaløta: Dagurin í myndum |
| 00:00 | Frívillig bønarløta |
| 01:00 | Góða nátt. Andakt inni á kømrunum |

**Magni Selfoss úr Sørvági er á leguni saman við fýra øðrum úr heimbygdini. – Her er bara festligt at vera, sigur hann**

UNGDÓMSLEGA

*Snorri Brend*
*Myndir: Bárður*



*Magni Selfoss hevur verið trý ár á rað á ungdómslegum í Nesvík. – Her er gott at vera, sigur hann*

**Nesvík:** - Hetta er triðja árið á rað, at eg eri á hesum ungdómslegunum, sigur 16 ára gamli Magni.

Hann hevur verið sera fegin um tær undanfarnu legurnar, og tí ynskti hann at koma við eisini á hesa leguna.

- Tað angri eg ikki. Her er ordiliga skeg, sigur hann.

Vit fingu orð á hann seinnapartin henda mikudagin, meðan ein fríløta var á skránni. Um stutta løtu var næsta punkt á skránni.

### Ringt at skilja alt

Á skránni fyri hesa ungdómsleguna er mangt og hvat spennandi við áhuga fyri tey ungu.

Tað eru tó nøkur ting, sum Magna hevur dámað sera væl við leguni:

- Mær dámar væl at koma saman við øðrum ungfólkum. Tað er so deiligt bara at hyyygga sær og práta saman við øll hini.

- Og so er tað eisini so gott at hoyra um Gud, sigur hann.

Evnið á leguni í ár er bønin Faðir Vár, og tað er ein bøn, sum Magni eisini kennir frammanundan.

- Tað er eitt sindur ringt at skilja alt, men eg havi so fingið okkurt burtur úr kortini, m.a. tað at tað eru sjey bønir í Faðir Vár, sigur hann.

Samrøðan er liðug, og Magni skundar sær avstað. Sum ein av ídnu fótbóltsspælarunum í Sørvági, skal hann nú gera seg kláran til enn ein dyst.

Klokkan 16 er fótbóltskapping á skránni. Og so er hann flogin.



*Summir kokkar »forderva« matin. Hesir eru kortini ikki millum teirra, her tey eru í ferð við at baka pannukøkur til 170 ungfólk*



*Lilja og Herborg (h.m.) dáma væl at spæla flogbólt. Her royna tær seg við eini blokering*



*Hevur ein ikki hug at spæla fótbólt uttandura, so er altíð møguleiki at hita upp við fótbóltsspæli innanveggja. Her gongur hart fyri seg*



*Lokið verk í sminkukappingini, og nú skal so úrslitið avmyndast*

## Matarskrá

Mikudagur 10. august

Morgunmatur
Kornflakes
Hitaðir bollar
Smør, ostur, súltutoy, sukurlátupálegg

Døgurði
Gullash (45 kg.)
Eplir (50 kg.)
Salat: 4 kinakál, 6 reyðar piparfruktir, 6 grønar piparfruktir. Møguliga rosinur og kokus í eina skál við síðuna av.

Drekka seinnapart
Saft, kaffi, te, frukt

Nátturði
Rugbreyð (12 stk.)
Livurposteik (uml. 4 dósir), agurk, servelatpylsa, speigupylsa, uml. 120 egg, høsnasalat (x 16 – uppskrift úr Góðaráð), banan.

Kvølddrekka
Pannukøkur og skuffukaka